Vikuskifti

Nr. 25 • fríggjadagur • 3. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tá William Heinesen prýddi Bygdaleiðir

Í 1990 gjørdi Samferðslustovan eina forkunnuga linjuál við einum bussi hjá Bygdaleiðum. Persónarnar í og uttan fyri bussin, hevði William Heinesen teknað. Í hesum døgum er forkunnug framsýning við fotomyndum hjá Williami Heinsen at síggja í Snarskivuni hjá Tórshavnar Býráð




*Hesa linjuálina gav Samferðslustovan út í 1990. Tað sermerkta við linjuálini eru persónstekningarnar hjá Williami Heinsen, sum prýða bussin. Niðanfyri er frágreiðing um allar persónarnar, sum William teknaði*

**FRAMSÝNING**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í sambandi við 90 ára føðingardag William Heinesens í 1990 skipaði Tórshavnar Býarsavn fyri framsýning í Ydun á Høgareyni at heiðra okkara kendasta havnarborgara nakrantíð.

Framsýningin fór seinni til Íslands og varð sett upp í Norðurlandahúsinum í Reykjavík. Fotomyndirnar eru úr privata myndasavninum hjá Williami Heinesen, og tær flestu eru frá 1930-árunum, tá ið Elisa og William settu búgv uppi á trøðni undir Varða, og William av álvara var farin at gera vart við seg sum rithøvundur.

Finnur Johansen, sum var býarsavnsvørður, lænti tær hálvthundrað svørt/hvítu myndirnar frá soni Williams, Zakariasi Heinesen, til framsýningina í 1990, og hesa ferð hevur Finnur aftur rætt eina hjálpandi hond.

Tann 12. januar læt upp framsýning við somu myndum í Snarskivuni hjá Tórshavnar kommunu, og framsýningin er opin fram til grækarismessu 12. mars. Opið er tá Snarskivan annars er opin – fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.

Ein av lutunum, ið síggjast kunnu á framsýningini, er bussurin hjá Bygdaleiðum, sum er avmyndaður á eini linjuál, sum Finnur Johansen lat gera um hetta mundið í 1990. Vit hava fingið Finn Johansen at greiða okkum frá um persónarnar, sum William Heinesen hevur teknað, og sum Finnur setti í og uttan fyri bussin á linjuálini:

Inni í bussinum, høgrumegin frá:

1. Óla Svenn, stýrir bussinum. Óla Svenn æt í veruleikanum Óli Olsen (21.06.1860), men var sonur Svenn, Óli hjá Svenn, ið varð til Óla Svenn. Hann var verfaðir Wenzel Petersen og Vilhelm Nielsen, og hann var langabbi Jóanes Nielsen, rithøvund.

2. Jardus, Theanjardus Dam (27.04.1840). Hann var sonur Johan Hendrik Dam ú Kollafirði og Johonnu Frederiku Reinert úr Kaldbak, ið vóru uppsitarafólk á embætisgarðinum í Hoyvík. Jardus var elstur av níggju systkinum, sum flestøll búsettust í Havn.

3. Niels á Bakka, Niels Debes (24.11.1852) var ættaður av Bakka og giftur við Lisu, systir Jóanes úr Kirkjubø, ið var giftur við Gustu. Niels og Lisa áttu, Sámal í Handilsforeiningini, Onnu, konu Harald á Trappuni, Hans hjá Lisu og Christian pápa Diaba Debes

4. Emil hjá Lísbettu, Emil Danielsen (1860). Hann búði í Bringsnagøtu í Skotinum, sum hann røpt Kahúttina. Hann var sonur Lísbettu og mammubeiggi Havnar Jørgen og Jacob Danielsen, Jagee, sum hevði kioskina á Vaglinum.

5. Magnus Einarson (04.07.1851), íslendingur og ursmiður. Sonur hansara var tann ikki heilt ókendi Karl Einarsson, kanska betri kendur sum Dunganun ella Jarlurin av Sant Kilda.

6. Polla Vilhelm, eldri. Rætta navn hansara var Vilhelm Poulsen (28.03.1848), og sonur Polla. Polla Vilhelm átti ein son, sum eisini æt Vilhelm Poulsen, og sum eldri fólk minnast sum Polla Vilhelm. Hann var pápi Valdemar Poulsen, frisørin.

7. Dreyarin, Christopher Nyholm Debes (05.09.1815). Elsa Birgitta Debes, Lítla Elsa, var dóttir hansara, og hon var manna Nyholm Debes. Dreyarin var langabbi Anfinn Debes.

8. Gamli Restorff, Martin Christian Restorff (1816), M. C. Restorff, sum kom til Føroya í 1849 sum bakari við kongliga handilin. Tá kongligi handilin gavst í 1856, fór gamli Restorff sjálvur at handla. Hann hevði stóran handlil í Vágsbotni við nógvum úthandlum um alt landið. Gamli Restorff var heiðursborgari í Havn, og hann var langabbi William Heinesen, sum vit heiðra við hesi framsýning. William Heinesen var eisini heiðursborgari í Havn.

9. Bakar Hansen, Georg Casper Hansen (03.09.1844), bakari av Bornholm. Kona hansara var Marianna Jacobsen, dóttir Dánjal Jacobsen av Húsum og systir Eliesar Jacobsen, skrivstovumann á amtskontórinum, róptur Essa hjá Dánjali. Dóttur Bakar Hansen, Cathrina Maria Hansen, giftist við Jákup Dahl, prósti.

10. Fríðrikur Petersen, próstur

11. Apotekarin Finsen, Olaf Finsen (03.02.1859), apotekarin. Hann var sonur Hannes Finsen, fúta og seinni amtmann, og elsti beiggi læknan Niels R. Finsen. Olaf Finsen stovnaði fyrsta apotekið í Føroyum í 1883 á Dunga í Bringsnagøtu, og í 1898 flutti hann út í Tinganes. Í 1910 gjørdist apotekari í Vejle, og fór av landinum.

12. Toku Sigvald, Sigvald Severinsen (1839) búði, sum navnið sigur í Tokustovu. Hann var roknaður sum ein løgin stavnur, ið millum annað gav út eina avís. Hon kom bara út í einum eintaki hvørja ferð, tí hon varð skrivað í hond.

13. Christian í Áarstovu, Christian Djurhuus (05.09.1882), sonur Óla Jákup Djurhuus í Áarstovu, faðir Birruna Nislasen og Dia á Vertshúsinum, yngra, bróður Janus Djurhuus, Hans Andreas Djurhuus, Poul Juul Djurhuus og bróðursonur Hans Andreas Djurhuus, gamla Dia á Vertshúsinum.

14. Strandasnikkarin, Petur Jacob Midjord (15.06.1845) var eisini roknaður sum ein løgin stavnur. Hann búði í húsunum hjá Elduvíks Jóanesi úti á Skúlareyni. Tað vóru húsini, sum Lützen byrjaði at handla í. Í húsinum var framsýningargluggi, sum stavaði frá handlinum, og í gluggan plagdi hann at heingja seðlar við viðmerkingum um ymiskt, ið hendi í samfelagnum, ella glósir til onkran, eisini kundi hann seta lutir í gluggan, ið sipaðu til eitthvørt fyribrygdi.

15. Jóa Poul, Poul Poulsen (16.11.1885), var sonur Johan Paula Poulsen, róptur Jóa. Jóa Poul var maskinmaður og sigldi úti í verðini, bæði fyri og undir seinna kríggj, og hevði verið úti fyri eitt sindur av hvørjum. Eftir kríggið sigldi hann við Smirli og føroyskum trolarum. Hann búði saman við konuni Thoru, ið var donsk, og børnunum í Dandastovu.

16. Søren Müller (13.06.1856), sonur Hans Christopher Müller, seinasta sýslumann í Havn. Søren Müller átti skip, eisini var hann kassameistari, blaðstjóri og avgreiðslumaður fyri DFDS, og tað sæst eisini á honum.

17. William Heinesen (15.01.1900). Hann situr aftast, og er við sum eygleiðari.

Uttanfyri bussin, høgrumegin frá

1. Rasmus Effersøe (31.05.1856), landbrúkskandidat, vinnulívsmaður, løgtingsmaður og skald.

2. Traber, Emil Traber (25.08.1856), lærari og bókavørður, umframt at hann gjørdi temperaturmátingar av luft og sjógvi. Hann bygdi uppi á Glaðsheyggi í 1899. Tað, sum var spell við hesum húsunum, var ikki bara, at tey vóru koyrd burtur, men meira tað húsið, sum kom í staðin.

3. Júst á Húsum, Júst Jacobsen (28.11.1860), bóndi á Eystara Húsagarði. Dótturin Olevina, Inna, giftist við Andreas Djurhuus úr Kollafirði, og tey fluttu bóndahúsini fyri seinna kríggj, av Húsabrúgv og niðan ímóti Hálsi, har tey standa í horninum á R. C. Effersæøsgøtu og Tjaldursvegi. Tey verða rópt Mexiko.

4. Eiðis Poul, Poul Andreasen (22.10.1828). Hann giftist við einkjuni eftir Christopher Nyholm Debes, Johonnu Hermansdatter úr Tjørnuvík. Tey búðu í húsunum norðan fyri Skrivarastovu, og tey áttu sonin Andreas Andreasen, betri kendur sum seglmakarin. Hann búði á Cafènum og flutt seinni til Danmarkar.